# Bretskur ráðharri rósar kristnari ávirkan



*Parmjit Dhanda (høgrumegin)sær týdning av kristindóminum í bretska samfelagnum*

**- Stórabretland átti at hálova ávirkanini hjá kristindóminum á mentan okkara. Hetta segði bretski ráðharrin, Parmjit Dhanda, tá Undirhúsið hevði orðaskifti um fobi ímóti kristindóminum í farnu viku**

ÁTRÚNAÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Ongland:** Dhanba, sum er ráðharri í tí sum svarar til kommunumál, fegnaðist undir orðaskiftinum um, hvussu kristnir bólkar altíð hava stríðst fyri talufrælsinum og trúarfrælsinum. Hesir bólkarnir hava eisini havt sín týðandi leiklut í, hvussu hesi rættindini verða vird í dag.

– Vit áttu øll at verið tilvitað um hetta og hálova tí, segði hann sambært BBC.

Parmjit Singh Dhanda, sum hansara fulla navn er, er borin í heim í London av foreldrum sum eru flutt hagar úr India.

Tað var annars tingmaðurin, Mark Pritchard úr konservativa flokkinum sum hevði tikið stig til orðaskiftið.

Hann helt, at "politiskt rættar brigadur", sum hann málbar seg, undirgrava teir kristnu siðirnar við ynskinum um at fáa teir at hóska til marginal viðurskifti í samfelagnum.

## Sleppa kristnum siðum

Pritchard ávaraði ímóti at lata tey viðgongdu taka kristindómin sum gíðsil, við at siga seg vera verjan fyri siðirnar. Høgrasinnaði bretski tjóðskaparflokkurin (BNP) hevur longu býtt út kort í Staffordshire við Jósef, Mariu og Jesus-barninum á. Teksturin vísti millum annað til "arv, siðir og mentan".

– Er stjórnin til reiðar at standa á síðulinjuni og sleppa kristnu siðunum í landinum til flokkar, hvørs endamál er at spjaða hatur?, spurdi Pritchard undir orðaskiftinum.

Hann metti, at kristindómurin verður undirgravaður í loyndum, hóast 3,2 milliónir bretar ganga í kirkju hvønn sunnudag. Tingmaðurin vísti millum annað á, at tað verður alsamt truplari at finna jólakort við nøkrum sum vísir til Kristus.

– Tíðin er búgvin at vit slakta tann politiskt rætta drekan, sló hann fast.

Tað vóru kortini ikki øll, sum vóru eins fegin um orðaskiftið og søgdu beinleiðis, at tørvur ikki var á einum slíkum.

Ein teirra var Keith Proteus Wood, sum er stjóri í fyritøkuni Proteus Wood. Hann metti orðaskiftið sum spill av tíð, sum Undirhúsið kundi brúkt til onnur týðandi mál.

– Tey kristnu verða als ikki skúgvað til viks í almenna lívinum. Tey eru heldur yvirumboðaði, segði hann við BBC.

# Fleiri muslimar í kirkju á jólum

**Muslimskir næmingar luttaka í stórum tali við jólagudstænastur og onnur kirkjulig tiltøk bæði í skúlum og í kirkjum. – Smædnið hjá muslimunum mótvegis kristindóminum er vorðið minni, staðfestir ein granskari**

ÁTRÚNAÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Danmark:** Tájólaklokkurnar ringja til jólagudstænastu ella jólahald í donsku fólkakirkjuni, eru tað ikki longur bert etnisk donsk børn, sum fylla kirkjubeinkirnar. Alsamt fleiri børn av øðrum etniskum uppruna, eisini muslimar fylgja nevniliga floksfelagum sínum, tá farið verður í lokalu kirkjuna í desember mánaði.

Danska blaðið Kristelig Dagblad ringdi til 20 prestar kring alt Danmark, og siga 19 teirra at muslimsk børn luttaka við tiltøkini, sum teir fyriskipa undan jólum.

– Tað koma hópurin av muslimskum børnum til okkara tiltøk. Eg haldi, at hetta er vorðið meiri vanligt, samstundis sum tað eru komnir fleiri og fleiri muslimar til Danmarkar. Eg haldi eisini, at tað er størri opinleiki mótvegis muslimum í fólkakirkjuni. Teir eru hjartaliga vælkomnir, sigur sóknarpresturin Paul Kofoed Christiansen í Roskilde Domkirke.

– Vit síggja, at í dag koma fleiri muslimsk børn í kirkju enn fyri 5-6 árum síðani. Hetta er ein týðilig gongd, hóast ikki allir teir muslimsku næmingarnir í flokkinum møta, sigur Esben Andersen, sum er prestur í Brabrand Kirke í Århus.

Kanningin hjá Kristelig Dagblad vísir eisini, at eingin av teimum 19 kirkjunum, sum fáa vitjan av muslimskum børnum á jólum, hava havt nakrar trupulleikar orsakað av hesum.

– Mín meting er, at nógv muslimsk foreldur eru trygg við at lata børn síni koma í eina kirkju. Kirkjan er rúmið hjá trúnni, og nógv muslimsk foreldur heita á børn síni at trúgva, hóast tey sjálvandi hava aðrar mátar at liva út sína trúgv. Tí er tað lættari hjá muslimum at fyrihalda seg til støð, har ein tekur sína trúgv í álvara, heldur enn støð har eingin trúgv er at finna, sigur Paul Kofoed Christiansen.

Inge Lien-gaard, sum er ph.d.-lesandi við sergrein í islam á Aarhus Universiteti sigur, at muslimsk foreldur einki hava ímóti tiltøkum í kirkjunum.

– Teirra uppfatan er, at hesi tiltøkini ikki eru missionerandi. Tá teirra børn koma í kirkjuna, er tað eitt úttrykk fyri at foreldrini halda, at hetta er ein partur av donskum siði, sum teirra børn skulu vera við í, sigur hon.

Smædnið mótvegis kristnu kirkjuni er ikki so stórt, sum nógv kanska ímynda sær.

– Eg haldi ikki, at foreldrini hjá tilflytarabørnunum bera so stóran ótta fyri religiónini, sum mong donsk foreldur. Tey hava avslappað viðurskifti mótvegis religión, sigur Inge Lien-gaard.



# »Náði, vinir mínir, náði!«



*Eftir Svenning av Lofti*

Orðini omanfyri eigur hin líðandi Job, hvørs lív hevur verið mongum bíbliulesara ein stór og óloyst gáta. Men tað er gott at vita, at óloystu gátur manna, eru Gudi eingin loyna.

Sjálvt í teirri myrkastu tíðini í Føroyum, tá ið deyðadómar vórðu feldir og framdir, var kortini ein møguleiki fyri náði vístur, hóast henda náði viðhvørt var treytað. Sælingarhella í Havn er eitt dømi. Kundi hin deyðadømdi klára seg upp á Sælingarhellu, var hann bjargaður.

Hesin treytaði møguleikin fyri náði hevði óivað sín uppruna í Gamla Testamenti. Stutt áðrenn Ísraelsfólk skuldu fara inn í landið og taka tað í ogn, gav Harrin teimum boð um griðstaðirnar (5. Mósebók 19). Tey skuldu halga seks býir í landinum til griðstaðir. Vit kundu eisini nevnt teir fyri náðibýir.

Um onkur av óvart hevði volt øðrum deyðamein, so skuldi hesin hava møguleika at flýggja til ein av hesum griðstøðum og verða tryggur har. Hesir býir skuldu liggja soleiðis í frástøðu frá hvørjum øðrum, at ikki skuldi vera langt at fara til nakran teirra hvar í landinum ein var staddur.

Tað er sera áhugavert, at henda náði varð víst, hóast hin harða Móselóg var í fullum gildi, har hvørt lítið misbrot fekk sína revsing. Men hetta vísir okkum hvussu Gudi longdist at vísa menniskjum náði.

Hesir griðstaðir eitt rámandi dømi um týdningin av teirri verju sum griðstaðirnir í ísraelslandi góvu teimum, ið flýddu hagar. Allir teir 6 býirnir, sum ísraelsfólk skuldu halga sum griðstaðir eru nevndir við navni.

Griðstaðirnir í gamla Testamenti eru ein fyrimynd av tí heimsumfatandi griðstaðnum, sum er Jesus Kristus. Tann, sum søkir grið hjá honum, fær grið og syndanna fyrigeving fyri allar syndir sínar í allar ævir.

Mika profetur sigur: "Hvør er Gud sum Tú, Gud, sum tekur burtur misbrot teirra og fyrigevur synd teirra, ið eftir eru av arvi Hansara. Hann goymir í allar ævir ikki vreiði sína, tí Hann hevur hug at vísa náði. Hann skal aftur miskunna okkum. Hann skal traðka niður misbrot okkara. Tú skalt kasta allar syndir teirra í djúp havsins."

(Mika 7,18-19)